## VIÐMERKINGAR

# Er Norrønufrágreiðingin frá Skipaeftirlitinum eitt sjuskverk?

Eftir Anni á Hædd,
løgfrøðingi

**2. partur**

**Kaningararbeiðið og upplýsingargrundarlagið hjá Skipaeftirlitinum**

Sambært sjálvskrivaða kanningarsetninginum hjá Skipaeftirlitinum, er uppgávan hjá Skipaeftirlitinum at kanna hesar spurningar í sambandi við óhappið 15. januar, sí síðu 3 í frágreiðingini:

1. Hvat var orsøkin til, at Norröna sigldi á viðarnesbryggjuna fyrru ferðina?
2. Hvat fekk skiparan til at gera av at fara frá aftur og sigla út aftur í fjørðin?
3. Hvat var orsøkin til, at siglt varð á molan á veg út aftur?
4. Hvat var orsøkin til, at skipið sigldi á Viðarnes aðru ferð?

Sum víst varð á í 1. parti, so heimilar grein 13 í lógini um trygd á sjónum bara at kanningar verða gjørdar, ið hava sum endamál "at staðfesta vanlukkuorsøkina". Brot nummar 2 í sjálvskrivaða kanningar-setninginum, "hvat fekk skiparan til at gera av at fara frá aftur og sigla út aftur í fjørðin?" er tí ikki fevnt av heimildargrundarlagnum í grein 13. Avgerðin hjá skiparanum um at fara út aftur í fjørðin at gera status er ikki í sjálvum sær ein orsøk til óhappið. Óhappið var longu hent og skaði komin á skipið.

Tað tykist sum at kanningarsetningur nummar 2 er tikin við, tí Skipaeftirlitið ikki hevur megnað at halda tunguna mitt í munninum, tá teir lótu seg í kanningarkasjettin. Teir gloymdu rætt og slætt at lata seg úr eftirlitskasjettinum, tilmælandi kasjettinum og niðurstøðukasjettinum í revsirættarligum spurningum. Ella við øðrum orðum, Skipaeftirlitið er fangað í sínum egnað netið av víðum heim-ildum - kanska uttan at vita tað - og hvørki stjórin sjálvur ella nakar úr fyrisitingini hjá Fiski-málaráðnum ella nøkur advokathjálp úr býnum hevur megnað ella verið so mikið at sær komin at gera Skipaeftirlitinum vart við trupulleikan.

Kanningarsetningurin avdúkar eisini onnur ivamál. Í kanningarsetningi 1, 3 og 4 avgerð Skipa-eftirlitið at kanna, hví skipið sigldi á.

### At sigla ella ikki at sigla, tað er spurningurin

Orðingarnar hjá Skipaeftirlitinum benda á, at teir veruliga ikki sjálvir kenna mun á at sigla ella ikki at sigla, ella, at teir, sum sonevndur skipakønur myndugleiki, halda seg kunna brúka hugtøk og gera staðfestingar, uttan at neyðugt er at grundgeva fyri tí, bara tí teir eru Skipaeftirlitið?

Spyrji tykkum sjálvi hvør tað er, sum myndar Skipaeftirlitið í einum almennum kanningarmáli? Hvør er teirra fakligi førleiki? Hvør hevur eftirlitið við og tryggjar, at okkara sonevndi serkøni skipamyndugleiki veruliga er serkønur?

Hvør torir at stíga fram og prógva, at tann størsta vitanin og besti førleikin, vit føroyingar eiga tá tað snýr seg um skipa-trygd, siglingartrygd, skipstøkni, manøvruspurningar, váðalýsingar í sambandi við óhapp o.s.fr., situr vesturi í Vágunum á Skipaeftirlitinum?

Skipaeftirlitið hevur við sínari frágreiðing avdúkað, at eftir teirra meting er tað als ikki neyðugt at seta spurnartekin við, um skipið sigldi ella ikki sigldi, rætt og slætt tí Norrøna í teirra hugaheimi sigldi.

### Gongur tað, so gongur tað

Hvat er tað so fyri eitt upplýsingargrundarlag, sum Skipaeftirlitið hevur brúkt fyri at gera sítt kanningar--arbeiði sambært sjálvskrivaða kanningarsetninginum?

Úr yvirlitinum til Norrønu-frágreiðingina og á síðu 3 sæst, at serliga sjófrágreiðingar, sjálvgjørdar simulatorroyndir og eftirfylgjandi samrøður umframt videoupptøkur og myndir av hendingini hava vigað nógv.

Sjófrágreiðingar vórðu givnar av manningini undir vitnisábyrgd stutt eftir hendingina. Tað framgongur úr rættarbókini, at Skipaeftirlitið ikki nýtti hetta høvi at skaffa sær neyðugar upp-lýsingar frá manningini. Í staðin varð neyðugt hjá Skipaeftirlitinum at heita á manningina síðst í februar mánaða at geva fleiri upplýsingar til málið. Og so varð gjørt.

Um hesar samrøður verða bara nevnt, at tær vóru hildnar, sí brot 2.4 í frágreiðingini. Lítið ella onki verður sagt um, hvat samrøðurnar snúði seg um, uttan tá upplýsingar úr samrøðunum kunnu brúkast ímóti skiparanum og onki verður sagt um formliga heimildargrundarlagið hjá Skipaeftirlitinum fyri at hava slíkar samrøður við manningina.

Hin tyngsti bitin í frágreiðingini og í fylgiskjølunum til frágreiðingina eru eftirgjørdu simulatorroyndirnar, sum Skipaeftirlitið hevur gjørt í Danmark. Og fyri at simulatorroyndirnar skulu síggja út til at vera so eftirfarandi sum gjørligt, varð vindmegin sett til 23 m/s í telduni. Skipaeftirlitið fer eitt stig longur og staðfestir niðast á síðu 3, at vissan fyri at simulatorroyndirnar vísa "hvat hendi" er 98 %. Tíverri kann ein staðfesta, at Skipaeftirlitið aftur her hevur gloymt sín kanningarsetning, tí so nógvir upplýsingar frammanundan eru tøkir um, hvat hendi. Tað hava allir føroyingar sæð fleiri ferðir á sjónvarpsskýggjanum. Kanningarsetningurin hjá Skipaeftirlitinum er at kanna, orsøkina ella orsøkirnar til, at óhappið hendi. At brúka ein simulator og í tíggjutúsundtals av krónum fyri at kanna hvat hendi er púra burturvið, tá hugsað verður um, at fleiri versiónir av sjónvarps-myndum vísa hvat hendi.

Hin gløggi lesarin hevur helst spurt seg sjálvan, um tað er í lagi, at ein almennur myndugleiki á henda hátt selektivt kann velja, hvørjar upplýsingar hann kann leggja dent á, og hvørjar upplýsingar hann kann velja at síggja burtur frá. Sama ger seg galdandi fyri avgerðina av, hvørjar upplýsingar og fylgiskjøl myndugleikin selektivt velur at almannakunngera og hvørjar upplýsing-ar og fylgiskjøl myndugleikin selektivt velur at halda aftur ella dylja.

Hví er ikki alt tilfarið viðvíkjandi Norrønu-óhappinum og kanningararbeiðinum hjá Skipaeftir-litinum lagt út á alnetið? Hevur ein almennur myndugleiki nakað at dylja í einum kanningarmáli sambært grein 13 í lógini um trygd á sjónum? Ella hevur Skipaeftirlitið sjuska seg fram til eitt úrslit undir paroluni: gongur tað, so gongur tað?

### Greiningin

Øll, ið hava áhuga fyri trygd á sjónum og annars áhuga í Norrønu-frágreiðingini eiga at nærlesa greiningina hjá Skipaeftirlitinum undir punkt 8 í frágreiðingini. Spyrji tykkum sjálvi hesar spurningar:

- á hvørjum upplýsingargrundarlagi eru greiningarnar gjørdar
- hvussu er greiningin gjørd (altso eftir hvørji metodu) og
- hvør tað er, sum hevur gjørt hesar greiningar

Les frágreiðingina á www.fma.fo og met sjálv/ur

### Serfrøði ella ikki

Skipaeftirlitið hevur fyrr í ár alment boðað frá, at almannakunngerðingin av Norrønu-frágreiðingini einaferð mátti útsetast, tí útlendsk serfrøði skuldi uppí leikin. Nú frágreiðingin er liðug og almannakunngjørd við tí tilfari, sum Skipaeftirlitið hevur valt at leggja við, vil ongin avdúka, hvør serfrøði hevur verið uppi í leikinum, hvat serfrøðin hevur verið brúkt til í Norrønu-málinum ella hvat útlendska serfrøðin hevur staðfest og ikki.

Kann tað hugsast, at stjórin á Skipaeftirlitinum hevur fingið munnkurv - kanska tí at Fiskimála-ráðið, sum evsti ábyrgdarhavandi fyrisitingarligi myndugleiki, ikki orkar at fáa fleiri sjuskverk at rudda upp í?

Hvussu er og ikki, so er tað týðiligt, at higartil hevur ongin almennur myndugleiki, sum hevur havt nakað við Norrønu-málið at gera, tora at taka "frágreiðingina" frá munninum.

Tala er silvur, men tøgn er gull.......

Í triðja parti verður spurningurin um trúvirðið í Norrønu-frágreiðingini viðgjørdur.

# Nýggj rithøvundabók

Rithøvundafelag Føroya hevur givið út nýggja útgávu av Rithøvundabókini.

Fyri nøkrum árum síðani fór Rithøvundafelagið undir eitt nýtt tiltak fyri at gera føroyskar rithøvundar meira sjónligar. Felagið bjóðaði hvørjum einstakum av limum sínum at skriva eina grein um seg sjálvan og geva hetta út so tað bar til hjá almenninginum at síggja hvørji tey fólk eru, sum eru upphavsmenn til bøkur, og hvat tey hava skrivað meir enn tann bókin, sum viðkomandi hevur í hondini.

Burtur úr hesum kom tann forvitnisliga rithøvundabókin í 1995, sum hevur verið nógv nýtt av blaðmonnum og skúlaungdómi, sum sóknast eftir upplýsingum um tað sum fer fram í føroyskum bókmentanarlívi.

Síðani eru níggju ár farin, og bókin er, sum frá er liðið, vorðin rættiliga avoldað.

Tí hevur felagið gjørt av at fáa til vega eina nýggja útgávu av bókini, og er hon nú komin í bókabúðirnar.

Nakrir av teimum, sum vóru við í tí gomlu bókini, eru ikki við í hesi.

Summir hava ikki viljað verið við, aðrir eru ikki longur í felagnum. Tey sum vilja fáa meir at vita um hesar, kunnu kaga í bókina frá 1995. Men hópur av nýggjum limum eru komnir síðani, og hesir eru allir við.

Bókin er eitt rættiligt føroyskt tiltak. Hon er skrivað av limunum á føroyskum, sett, prentað og innbundin á Føroyaprenti, og vestmenningurin Martin Joensen hevur gjørt kápumyndina. Zakarias Wang í Hoyvík hevur lagt útgávuna til rættis. Men føroyingar eru spjaddir víða um heim, og út øllum ættum eru greinir komnar til hesa bók, so her hava limirnir tikið eitt megnartak, sum hevur givið eitt gott úrslit.

*Rithøvundafelag Føroya*

# Pallborðsfundur um Landsbanka og Hagstovu

Tit verða hervið boðin til pallborðsfund á Hotel Hafnia 2. desember 2004, kl 13:00 til 15:00

Evnið á fundinum verður: Samanleggingin av Landsbankanum og Hagstovuni.

Landsstýrið hevur í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2005 boðað frá ætlanum um at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman í ein stovn. Í hesum sambandi kundi verið áhugavert at fingið partarnar at sitið við sama borð og viðgjørt evnið.

Endamálið við panelfundinum er at fáa kjak millum avvarandi partar, áðrenn endaligu støðutakanina í Løgtinginum.

**Við panelið sita:**

- Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum
- Hermann Oskarsson, stjóri á Hagstovuni
- Sigurð Poulsen, stjóri í Landsbankanum og
- Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka

Høvi verður hjá fundarluttakarum at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Fundarluttakarar verða løgtings- og landsstýrisfólk, løgtingsskrivarar og nøkur starvsfólk frá avvarandi stovnum.

**Vegna tingmanning Tjóðveldisfloksins**

**Karsten Hansen, framsøgumaður í búskaparmálum**